# Margretha í Heimavirkinum

*Heilt uttan fyri almennu skránna, og uttan, at nakar skuldi vita av, fór Margretha drotning ein privatan innkeypstúr í Føroyskt Heimavirki á Kongabrúnni í Havn*




EDVARD JOENSEN
MYNDIR: JENS K. VANG

Næstu ferð, litaða danska vikupressan fer at vísa myndir av Nikolaj prinsi, verður tað kanska í føroyskari troyggju.

Omma hansara, Margretha II, drotning Danmarkar, var hvítusunnuaftan ein óalmennan handilstúr í Føroyskum Heimavirki á Kongabrúnni í Havn.

Tað var ikki við í skránni, at drotningin fór ein túr í Heimavirkið. Ørindini skuldu vera, verður sagt, at keypa eina føroyska troyggju til ommusonin, Nikolaj prins.

Myndamaður okkara, Jens Kristian Vang, var sum tann einasti á staðnum. Men trygdarvørðarnir hjá drotningini vóru ikki so fegnir um, at hann kom ov nær.

Tir høvdu kortini einki ímóti, at myndir vórðu tiknar av drotningini burturfrá.

Eftir innkeypstúrin fór drotningin beinleiðis umborð aftur á kongaskipið at gera klárt til mentanarkvøldið í Norðurlandahúsinum.

# Drotningin fekk sóljur og hjálpirøtur



*Abbadóttir løgmans, Jórunn Kallsberg, handaði drotningi føroyskt blómutyssi, tá hon kom í land av Dannebrog hvítusunnuaftan*



EDVARD JOENSEN
MYNDIR: JENS K. VANG

Drotningavitjanin byrjaði alment á Havnarkaj leygardagin, hvítusunnuaftan, klokkan 14.30, tá Dannebrog legði at bryggju í Havn.

Asbjørn Heinesen, havnarfúti, loðsaði Dannebrog at bryggju, har nakað av fólki var samankomið at heilsa upp á drotningarhjúnini.

Margretha drotning var einsamøll á brúgvavongingnum ílætin bordeaux littan kjóla og svartan møttul uttanyvir. Tann traditionelli, stóri hatturin var svartur og kanska eitt sindur ringur at halda á høvdinum í fríska lotinum, sum var.

Klokkan 14.45 kom drotningin í land, og tá var Heindrikur prinsur eisini við.

Ríkisumboðið, løgmaður og borgarstjórin í Havn tóku í móti teimum á reyða leyparanum. Umframt var stórt fylgi av landsstýrismonnum, tingformanni og øðrum, sum til hoyra.

Havnar Hornorkestur spældi, meðan skipið legði at, og tá drotningin og prinsurin vóru komin í land, varð fyrst spældur »Kong Christian« og síðan »Tú alfagra land mítt.«

Størsta áhugan hjá pressufólkunum hevði, sum vanligt, lítla, fitta blómugentan, sum altíð er við til at geva drotningi blómur. Blómutyssið hesaferð var sermerkt. Vanligar føroyskar sóljur, randaðar av føroyskum hjálpirótum. Einfalt og vakurt.

Farið varð beinanveg til gongu út í Tinganes, har Jóannes Dalsgaard, søgufrøðingur, segði frá søguni á staðnum. Farið var út um húsini, og hugt varð at hellnuni og slíkum, sum hon goymir. Ivaleyst hevur tað hugað drotningini, sum er sera áhugað í søgu og fornfrøði.

Næsta tiltakið á skránni hjá drotningini er mentanarkvøld í Norðurlandahúsinum. Tað byrjar klokkan 19.00 og er fyri innbodnum.

Δ







# Prinsurin vitjaði Reyða Kross



*Eftir vitjanina í Tinganesi, fór Margretha Drotning umborð aftur á Dannebrog, meðan Heindrikur prinsur fór at vitja Reyða Kross Føroya*

EDVARD JOENSEN

Eftir vitjanina í Tinganesi, var Heindrikur prinsur í Vágsbotni og heilsaði upp á føroysk Reyða Kross fólk. Prinsurin er verji hjá Dansk Røde Kors, og tað var í hesum sambandi, at hann var inni á gólvinum hjá Reyða Krossi Føroya.

Úr Tinganesi fór Heindrikur prinsur til gongu oman í Vágsbotn, har Reyði Krossu Føroya heldur til.

Í fylgi við prinsinum, sum var í admiralsuniformi, var Høgni Hoydal, varaløgmaður. Høgni Hoydal var ikki í føroyskum klæðum ella koti, sum hann ofta plagar. Hann var í nýggjum, svørtum »ruskinsjakka« og svørtum buksum.

Uttan fyri inngongdin hjá Reyða Krossi Føroya í Vágsbotni, tók formaðurin, Suni Vinther, ímóti Heindriki prinsi. Síðan varð farið innum, har Suni Vinther helt eina stutta røðu, og prinsurin fekk høvið at ganga runt og tosa við fólk, sum hava eitthvørt tilknýti til Reyða Kross Føroya.

Reyði Krossur beyð ein kagffimunn og annars varð tosað um leyst og fast tann hálva tíman, vitjanin í nýístandsettu felagshølunum vardi.

Eftir vitjanina fór Heindrikur prinsur við bili umborð aftur á kongaskipið Dannebrog, sum liggur við molan í Havn.

Δ


team 85 · 31 65 11

Shetland Cruise 2000 summarið
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

Farið verður av Havnini mánadag og komið verður aftur mikudag



Gisting á hotelli
(í lágárstíð) úr einans ... 864,- fyri hvønn



Gisting á vallaraheimi
(í lágárstíð) úr einans ... 691,- fyri hvønn



Privat gisting
(í lágárstíð) úr einans ... 819,- fyri hvønn

Nógvir handlar hava opið týsdag til kl. 18.30

Á farstøðini í Lerwick er møguleiki fyri at lata inn viðføri til varðveitslu til fráferðina hjá Norrönu

Hvørt týskvøld frá kl. 18.30 - 24.00 verður skipað fyri útferð til m.a. Central Mainland og Scalloway. Vitjað verður á fleiri áhugaverdum støðum har m.a. verður sýnt fram hetlendskt handverk. Eisini er høvi at njóta eina hetlendska máltíð.



Ring og hoyr nærri !

e-mail: booking@smyril-line.fo